# ÍSF skorið hálva millión

**Eisini ítrótturin má svíða fyri trongu fíggjarligu tíðirnar og tað merkir, at stuðulin til ÍSF verður skorin við tíggju prosentum á komandi fíggjarlóg**

Leo Poulsen

Tað verður ofta tikið til, at stuðulin til ítróttin er væl farin, tí hann verður ríkiliga spardur inn aftur í hinum endanum.

Men argument hava iki hjálpt í hesum førinum, og tað harmast Petur Elias Petersen, ÍSF-forseti, um. Hinvegin skilir hann, at tá øll onnur í samfelagnum skulu spara, so má ítrótturin eisini taka eitt tak.

- Men vit hava fingið eitt skriv frá Mentamálaráðnum, har landsstýriskvinnan upplýsir okkum, at skerjingin bert verður í ár, og at játtanin til ÍSF aftur kemur upp á 5 milliónir í 2012, sigur Petur Elias Petersen.

Tað fer sjálvandi at ganga út yvir virksemi hjá einstøku sersambondunum, at stuðulin nú verður skerdur, og hvussu hesi fara at takla støðuna, verður upp til sersambondini.

Petur Elias Petersen hevur tó vónir um, at hendan skerjingin verður broytt í Fíggjarnevndini, og so leingi málið ikki er viðgjørt har, er heldur einki avgjørt.

Sambært Bill Justinussen, sum er limur í Fíggjarnevndini, er als ikki vist, at talan verður um nakra skerjing.

- Stendur tað til mín, skal játtanin til ítróttin ikki rørast, sigur Bill Justinussen.



*Flogbólturin er ein av teimum ítróttagreinunum, sum verða hart rakt, verður stuðulin frá landinum skerdur*






***Erhard Jacobsen***

*er útbúgvin bókavørður, starvaðist á Bókadeild Føroya Lærarafelags frá 1992 til 1994, og skrivaði bókina "Og so veit eg eina vakra søgu", Bókadeild Føroya Lærarafelags 1956-2006. Hann var eisini í síni tíð formaður í Starvsmannafelagnum.*

**Erhard, aðrastaðni í blaðnum tosa vit um Glæstribøkurnar, sum komu út í 1958. Tú nevndi í eini røðu, tá Bókadeildin fylti 50 ár, at tú á sinni ætlaði at tekna teg fyri øllum 12 bókunum. Men hvussu gekk við tí? Fekst tú allar?**

- Eg ætlaði at velja mær einar tríggjar-fýra, ja, kanska enntá allar 12, men har vóru boðini greið. Eg kundi sleppa at tekna meg fyri eina. Meira vóru ráðini ikki til.

- Ringt var at velja. Sumt var fyri gentur, tað sá eg beinanvegin, men so var ein, sum kallaðist Gelli-Smelli skúlabussurin. Hon ljóðaði áhugaverd, men tá ið eg ikki visti, hvat Gelli-Smelli merkti, helt eg tað ikki vera ráðiligt at velja hana. Nakað somu lagnu fekk Dunnu Billa horvin, tí Dunnu Billa, hvat var tað? Í Sørvági var ongin dunna, sum kallaðist Billa.

- Ein av Glæstribókunum kallaðist Komið og spælið lækni! Hon kundi kanska koma upp tal, serliga tá eg hugsaði um, hvussu tað viðhvørt kundi ganga fyri seg, tá ið vit plagdu at spæla lækni.

- Nei, í mínum føri fell valið av glæstribók á hina fittu Tummil lítli. Nú næstan 50 ár seinni tori eg at viðganga, at akkurát ta bókina minnist eg kortini ikki sum nakað serligt. (Kelda: www.blf.fo)

*snorri@sosialurin.fo*

## Í MORGIN

**5/8 °C**



12-17 m/s | 8-13 m/s

Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi, seinnapartin up í hvassan vind. Regn av og á og hitin millum 5 og 8 stig.

## FRÍGGJADAGIN

**4/7 °C**



8-13 m/s | 13-18 m/s

Strúkur í vindi ella hvassur vindur av eystri, seinnapartin minni vindur av landsynningi. Regn av og á og hitin millum 4 og 7 stig.

## LEYGARDAGIN

**3/6 °C**



5-10 m/s | 5-10 m/s

Gul til stívt andøvsgul av eystri og landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og landnyrðingi og lítið ella einki avfall. Hitin millum 2 og 6 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 970 hPa. vestan fyri Írland fer spakuliga í landsynning og grynnist.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið við Írland fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið við Føroyar stendur mestsum í stað.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 127 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | 5 | **Tromsø** | 6 | **Moskva** | 16 | **Athen** | 26 |
| **Reykjavík** | 11 | **Bergen** | 12 | **Berlin** | 25 | **Beijing** | 30 |
| **Tórshavn** | 10 | **Oslo** | 22 | **Paris** | 20 | **New Dehli** | 30 |
| **Lerwick** | 9 | **Stokkhólm** | 20 | **Madrid** | 28 | **Bangkok** | 34 |
| **Aberdeen** | 12 | **Keypmannah.** | 19 | **Róm** | 26 | **Sydney** | 14 |
| **London** | 19 | **Helsinki** | 16 | **Malorca** | 26 | **New York** | 33 |



**Petur Skeel Jacobsen**
greiðir frá um veðrið

## VESTFALLSKYRRINDI

13. nov Fyrra kvarter
15. nov Mánin longst frá jørðini
21. nov Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 17. nov | 03:09 | 15:27 | 02:09 | 14:27 | 02:24 | 14:42 | 05:09 | 17:27 | 06:09 | 18:27 | 01:24 | 13:42 | 00:24 | 12:42 | 03:24 | 15:42 | 04:24 | 16:42 | 02:54 | 15:12 | 04:09 | 16:27 |
| 18. nov | 03:45 | 16:03 | 02:45 | 15:03 | 03:00 | 15:18 | 05:45 | 18:03 | 06:45 | 19:03 | 02:00 | 14:18 | 01:00 | 13:18 | 04:00 | 16:18 | 05:00 | 17:18 | 03:30 | 15:48 | 04:45 | 17:03 |
| 19. nov | 04:22 | 16:42 | 03:22 | 15:42 | 03:37 | 15:57 | 06:22 | 18:42 | 07:22 | 19:42 | 02:37 | 14:57 | 01:37 | 13:57 | 04:37 | 16:57 | 05:37 | 17:57 | 04:07 | 16:27 | 05:22 | 17:42 |
| 20. nov | 05:03 | 17:25 | 04:03 | 16:25 | 04:18 | 16:40 | 07:03 | 19:25 | 08:03 | 20:25 | 03:18 | 15:40 | 02:18 | 14:40 | 05:18 | 17:40 | 06:18 | 18:40 | 04:48 | 17:10 | 06:03 | 18:25 |
| 21. nov | 05:48 | 18:09 | 04:48 | 17:09 | 05:03 | 17:24 | 07:48 | 20:09 | 08:48 | 21:09 | 04:03 | 16:24 | 03:03 | 15:24 | 06:03 | 18:24 | 07:03 | 19:24 | 05:33 | 17:54 | 06:48 | 19:09 |